**Toll- og Skattstova Føroya**

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 140 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær tríggjar økisskrivstovurnar, ið eru Suðuroki, Miðøki og Norðuroki røkja raksturin.

Í Suðuroki starvast 12 fólk. Skrivstovan er á Tvøroyri.

Heimasíða:
www.tollskatt.fo

E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo

# 2 størv innan eftirlitsarbeiði

Søkt verður eftir tveimum starvsfólkum til eftirlitið á Suðuroki at byrja skjótast gjørligt.

**Høvuðsuppgávur**
Størvini fevna í høvuðsheitum um eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirvirðisgjald, skatt og toll, og at ummæla innkomin kærumál.

Harumframt skulu loysast avgreiðsluuppgávur, s.s. fyrispurningar frá viðskiftafólki/vinnuni innan skatta- og avgjaldsøkið.

Tey, ið sett verða, skulu kunna tola, at broytingar verða framdar í starvsinnihaldinum vegna broytingar á stovninum. Eisini skulu tey, ið sett verða, kunna ferðast til annað øki, tá ið tað er neyðugt.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava roknskaparligan førleika, t.d. Cand. Merc., HA, HD, HH ella líknandi útbúgving.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarar hava góðar málsligar førleikar og teldukunnleika.

Røttu viðkomandi eru persónar, sum eru sjálvstøðug, arbeiðssom, fyrikomandi og duga at samstarva.

**Vit kunna bjóða**
Spennandi størv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eru fakliga krevjandi. 2 sjálvstøðug størv í góðum arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Núverandi setanarøki er Suðuroki, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og tann persónur, ið verður settur, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing um starvið fæst við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya, Suðuroki, Margret Joensen, økisstjóra, á tlf. 352600.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

**1. mars. 2006**

**Toll- og Skattstova Føroya**
Postrúm 2151
FO-165 Argir



# Stuðul frá FITUR

FITUR er grunnur, sum veitir stuðul innan samstarv millum Føroyar og Ísland, ferðavinnuni at frama.
Stuðul verður veittur innan hesi øki:
Ferðavinnuútbúgving
Samskipan av ferðum - "kombinationsturisme"
Fólksligt millumlandasamstarv, sum gevur vitan innan mentan, livihátt, vinnur v.m.
Samstarv millum flutningsfeløg
Marknaðarføring innan ferðavinnu

Til dømis verður stuðul veittur til:
- Ítróttarfeløg
- Skúlar og útbúgvingarstøð (kunningarferðir)
- Vinnufeløg
- Kommunal samstarvsfeløg
- Vinarbýir
- Hátíðarhald

Umsóknir skulu skrivast á donskum ella enskum og sendast til:

**FITUR**
**c/o Ferðaráð Føroya**
**Postsmoga 118**
**FO-110 Tórshavn**

Evstamark fyri at senda inn umsóknir er 10 februar 2006.
Nærri upplýsing og umsóknarblað fæst á ferðaráðunum, á www.tourist.fo og á www.icetourist.is

ÍSLAND • FØROYAR

# HANDVERKARAR



## til HVS arbeiðið til deildina í Havn

Talan er um eitt spennandi starv við góðum arbeiðsumstøðum og einum arbeiðsumhvørvi við nútímans amboðum.

Umsøkjarar skulu hava viðkomandi útbúgving, duga at samstava og geva íblástur til skilagóðar loysnir.

Løn sambært avtalu.

Umsóknir skulu verða Demich P/F í hendi í seinasta lagið 10. februar 2006

Umsóknir skulu sendast til:

Demich P/F
Postboks 378
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda seg til Torbjørn Hansen, telefon 309310/211071.

*Tann 27. januar 1960 var Fa. Demich stovnað, og felagið varð umskipað til partafelag tann 17. februar 1971. Tá helt felagið til á Tinghúsvegnum.*

*Í 1987 flutti Demich út á Stiðjagøtu í Tórshavn. Talan var um nýggjan bygning við HVS-handli, verkstaði og teknistovu, sum P/F Demich lat byggjað.*

*Í 2002 læt eisini deild upp í Vági við HVS-handli og verkstaði.*

*Í dag arbeiða uml. 35 fólk hjá P/F Demich, harav 3 í Vági.*

*við okkara dugnaligu starvsfólkum, handverkarum og verkfeðingum leggja vit stóran dent á gott handverk.*

*Umframt alt vanligt HVS-arbeiði hjá privatfólki (umvælingar og nýgerð), blikksmið og jarnsmið, leggur Demich p/f seg serliga eftir teimum størru HVS-arbeiðunum*

**Tórshavn:**
Stiðjagøta 2 - Postboks 378
Tel: 309310 - Fax: 309311

**Vágur:**
Á Marknoyri
Tel: 373535 - Fax: 373565

Lesið Sosialin

# Innadurakappingin

hjá ÍF sum skuldi verða 28. januar
verður 11.-12. februar.
Tilber at fara á heimasíðuna hjá if.olivant.fo